

*Ein starvsmaður leyp til at hjálpa kvinnuni, sum lá í túninum við ongum viti. Tað gekk sum eftir bókini. Venjingin var løgd soleiðis til rættis, at tað var sum ein verulig hending við royki og eldi, sum sløkkiliðið basti*

Myndir: Jens Kristian Vang

# Tilbúgvin til tað ringasta

## Hóast smávegis brek riggar tilbúgvingarætlanin hjá Tryggingarfelagnum til fulnar. Tað vísti venjingin hósdagin

Randi Jacobsen

Tá ið klokkan var farin av eitt seinnapartin hósdagin, fór alarmurin inni á Tryggingarfelagnum á Kongabrúnni í Havn at ýla.

Eldur var í, og roykurin breiddi seg um alt húsið við teimum mongu tilbygningunum.

Lítla løtu tustu starvsfólkini út í tún.

Har var tó eingin panikkur, tí tey vóru tá øll greið yvir, at hetta var ein venjing.

Tryggingarfelagið hevur eina tilbúgvingarætlan, sum út í æsir sigur, hvussu starvsfólkini skulu bera seg at, um eldur er í, onkur smellur ella fær skaða, eitt rør brestir o.s.v.

### Øll kenna ætlanina

Hesa ætlan hava øll skyldu til at kenna.

Og tað gera tey eisini, vísti venjingin.

Ætlanin sigur, at hvørja ferð eitt nýtt starvsfólk verður sett, skal viðkomandi skjótast gjørligt læra, hvat tilbúgvingarætlanin sigur.

So nógv av royki var í húsinum, at tey flestu noyddust at fara út gjøgnum ymsar bakdyr. Tær í móttøkuni sótu beint við høvuðsdyrnar og kundu tí fara út tann vegin, hóast nógvan royk.

Verri var, at tey sum sótu eitt sindur longur inni, eisini fóru út gjøgnum høvuðsdyrnar. Tað áttu tey ikki at gjørt, tí hevði roykurin verið eitrandi, høvdu tey sett seg í vanda.

Eini boð í ætlanini eru nevniliga, at eingin má seta seg sjálvan í vanda.

### Skjótt at telja upp

Tá ið tey komu út, býttu tey seg beinanvegin upp í deildir og stillaðu seg har, sum ætlanin sigur, at tey skulu stilla seg. Hetta er fyri at telja upp, um øll eru komin út.

Tá ið talt varð upp, vantaðu tvey starvsfólk. Taå vísti seg heilt skjótt, at annað starvsfólkið var statt heima, og hitt var hjá frisøri.

Alt tað riggaði fínt. Øll høvdu eisini hugsað um at hyggja inn á vesi og onnur rúm fyri at tryggja sær, at eingin var eftir inni.

### Nøkur tosaðu

Í tilbúgvingarætlanini stendur, at tá ið onkur ólukka hendir, mugu starvsfólkini ikki tosa við fjølmiðlarnar. Tað kann bara stjórin.

Blaðkvinnan hevði uppgávuna at royna, hvussu hesin parturin av tilbúgvingarætlanini riggaði.

Meginparturin av starvsfólkunum vildu ikki siga nakað, tá ið tey vórðu spurd, hvat hent var.

– Vit hava ikki loyvi til at siga nakað. Tosa við stjóran, svaraðu fleiri.

Lítið hjálpti, tá ið roynt var at fáa tey at tosa við grundgevingini, at stjórin ikki var at hitta.

Men tað eydnaðist kortini at fáa nøkur at tosa. Líkt var til, at tey høvdu gloymt ásetingina í ætlanini um ikki at tosa við miðlar.

Av tí at hetta var ein venjing, var ikki so nógv at fáa at vita. Annað enn at tey høvdu tryggjað sær, at eingin var inni, hvønn veg tey vóru komin út, og at tey flestu vóru farin gjøgnum gongina, har jakkar teirra hingu, og tí harvið sluppu frá at standa og frysta úti í kuldanum og sirminum.

### Veruligt

– Í fyrstani kendist tað veruligt, og vit blivi nokkso kløkk, segði ein.

Í túninum hevði ein persónur leiklutin at vera smallin um.

Tað gekk kanska í so long tíð, til nakar kom at hjálpa henni, men tá ið so ein í trygdarbólkinum á Tryggingini kom til, dugdi hann væl uppgávuna, gav hjartamasju við tólinum, sum Tryggingarfelagið hevur útvegað sær, gav fólkinum súrevni, til sjúkrabilurin kom, og sjúkrabilafólkini tóku yvir.

Svímaða kvinnan hevði leiklutin sum viðskiftafólk og var ikki komin longur enn í móttøkuna, tá ið alarmurin fór at ýla.

Tá ið sjálv venjingin var av, komu tveir menn til starvsfólkini at tosa um kreppuhjálp.

Av tí at hetta var ein venjing, var ikki tørvur á hjálp, men í veruliga lívinum kann meira enn so henda, at onkur hevur tørv á at tosa við sálarfrøðing. Johannes Nilssen nevndi tó, at hann hevur upplivað í venjing, at onkur bleiv illa fyri.

### Gott fyridømi

Hann rósti Tryggingarfelagnum fyri at hava so væl greinaða tilbúgvingarætlan. Slíka ætlan áttu øll arbeiðspláss at havt, segði hann.

Í tilbúgvingarætlanini stendur nágreiniliga, hvør hevur ábyrgd av hvørjum, og hvussu tey skulu bera seg at. Niðurfelt er, hvat stjórin, sum er tann einasti at tosa við miðlarnar, skal upplýsa.

Trygdarbólkurin hevur lært víðkaða fyrstu hjálp, og hini hava lært eitt sindur.

Í ætlanini stendur eisini um kunning til tey avvarðandi, um óhapp skuldi hent.

Umframt at hava slíkar og aðrar venjingar, verður dagliga kannað, um fluktvegirnir eru opnir, at hurðarnar kunnu latast upp, og einki stendur fyri.

Eftirmeting verður gjørd skjótt, men fyribils niðurstøðan var, at venjingin eydnaðist avbera væl.